# Starvsfólk til ferðavinnuútbúgving

Miðnám í Vestmanna søkir eftir fólki at íverkseta og fyriskipa ferðaleiðaraskeið, sum skal byrja sum skjótast og at fyrireika, íverkseta og fyriskipa nýggja ferðavinnuútbúgving at byrja í august 2018. Talan er um hálvtíðarstarv, sum fyribils er tíðaravmarkað til 30. juni 2019. Arbeiðsplássið verður á Miðnámi í Vestmanna og arbeiðstíðir eftir nærri avtalu við tann setta.

**Um útbúgvingarnar**

Ferðaleiðaraskeiðið skal útbúgva ferðaleiðarar við serligari vitan um Føroyar sum ferðamannaland. Ferðaleiðarar skulu kunna virka sum ferðaleiðarar hjá ferðamannabólkum á einum ella fleiri fremmandamálum.

Ferðavinnuútbúgvingin er fulltíðar útbúgving, sum tekur 1 ár íroknað stutta starvsvenjing. Ùtbúgvingin verður yrkisrættað og skal taka atlit til teir ymsu tørvirnar hjá ferðavinnuni. Innihaldið skal vera fjølbroytt og tekur støði í serføroyskum viðurskiftum. Tey lesandi skulu gerast før fyri at ráðleggja og fyriskipa tiltøk og túrar og sum heild kunna arbeiða innan føroyska ferðavinnu.

**Persónligir eginleikar**

Vit leggja stóran dent á, at starvsfólkið er álitisvekjandi og álítandi, dugir væl at samskifta, hevur góð samstarvsevni og kann arbeiða sjálvstøðugt.

**Førleikakrøv**

Ongi beinleiðis krøv eru til ávísa útbúgving, men tað er ein fyrimunur, um umsøkjarar hava miðal-, langa- ella hægri útbúgving og/ella praktiskar royndir innan ferðavinnu. Leiðsluroyndir og/ella royndir at fyriskipa og leggja tilrættis útbúgvingar er avgjørt ein fyrimunur.

**Løn og umsóknarfreist**

Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag
Umsókn við CV, avriti av prógvum, viðmælum o.ø. skulu sendast til fiskvest@fiskvest.fo **í seinasta lagi mikudagin 16. august 2017 kl. 12.** Starvið verður at seta sum skjótast.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jákup Andreasen, skúlastjóra, á tlf. 221 654.

---


**Miðnám í Vestmanna**
Postrúm 96
350 Vestmanna
fiskvest@fiskvest.fo